Fløga fløvar vælskapt brekað

Leygardagin verður fløguútgáva, og rimmar konsert í Norðurlandahúsinum sum áhugafelagið „Vælskapt brek„ skipar fyri

Leygardagin 30. september skal verkætlanin hjá áhugabólkinum »Vælskapt brek« standa sína endaligu roynd, og verður tað í Norðurlandahúsinum í Havn.

Tá kemur leingi væntaða og fjølbroytta fløgan út, eins og konsert við øllum sangunum og flestu av luttakarunum á fløguni verður um kvøldið. Um dagin verður so skipað fyri pallborðsfundi.

Við á konsertini verða tey, ið eiga sangirnar á fløguni, og aftrat sær hava tey góðar og royndar tónleikarar, so framførslan skal vera so góð sum gjørligt.

Tey í áhugabólkinum siga fløguna hava breitt og gott innihald, og ikki færri enn 19 sangir eru við. Alt eru hetta sangir, ið vóru við í sangkappingini, bólkurin skipaði fyri í vár.

Sangkappingin eydnaðist avbera væl, og nærum 80 sangir og løg komu inn, so her hevur verið ríkiliga nógv tilfar at velja burturúr.

Allur ágóðin frá fløguni verður latin Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum, MBF, og Ítróttarsambandinum fyri brekað, ÍSB.

Skráin fyri leygardagin er tann, at pallborðsfundurin verður í Klingruni í Norðurlandahúsinum seinnapartin kl. 15. Við pallborðið sita Helena Dam á Neystabø, Torbjørn Jacobsen, Doris Hansen, Petra Joensen, Rúna Sivertsen og Thurid Askham.

Um kvøldið, kl. 19.30, verður so stóra konsertin í høllini í Norðurlandahúsinum, ið telur mong av kendastu føroysku tónleikanøvnunum, so sum M.C. Restorff, Eivør Pállsdóttir, Martin Joensen, Dupultkvartettina og mong onnur.

Atgongumerki til konsertina eru at fáa í forsølu í Norðurlandahúsinum.

Kommunuval 2000:

Bíðirøðirnar skulu burtur

Í langa tíð hevur barnaansingartrupulleikin verið stórur í Tórshavnar kommunu, og 365 børn standa í dag á bíðilista til ansingarpláss.

At støðan er vorðin henda, stavar ikki minst frá tí veruleika, at Havnin er tað staðið, har øll vilja búgva. Tilflytingin, bæði av bygd og úr øðrum londum, hevur vundið so nógv upp á seg, at trupulleikin við barnaansingini samstundis er vaksin við rúkandi ferð.

Ítøkiliga verður nú farið undir at loysa trupulleikan, soleiðis at 122 nýggj ansingarpláss koma í ár, 230 í næsta ár og so 92 aftur í 2002. Harumframt tekur frítíðarskúlin 50 børn fleiri í næsta ár og 100 aftrat í 2002.

Ansingartørvurin verður tó bara nøktaður 90 prosent, tá hesi 444 barnaansingarplássini eru komin aftrat. Her vantar framvegis nakað í, áðrenn tørvurin er nøktaður 100 prosent.

So mikið meira eigur dentur at verða á at nøkta tørvin út í æsir, tí fáa øll hesi foreldrini børnini ansað, fer tað at skapa øktan produktivitet í kommununi. Og tað gagnar jú í síðsta enda bæði foreldrum, kommunu og samfelagnum sum heild.

Nú er loyst úr lagdi í hesum máli, men fyri framman eiga vit at hava sum mál at fáa loyst allan barnaansingartrupulleikan. Tað er ongantíð í lagi, at foreldur ikki kunnu fáa børn síni ansað. Fyrst og fremst má politisk

semja fáast um at seta pening av til endamálið, og at barnaansingin verður raðfest frammarlaga, tí hetta er eitt átroðkandi mál.

Í framtíðini skal tað vera heilt náttúrligt, at allar kommunalar útstykkingar fevna um barnaansing, so trupulleikarnir verða loystir miðvíst, bæði lokalt og í síni heild.

Hesum vil eg framhaldandi arbeiða fyri!

Heðin Mortensen,
býráðslimur

Valið í høvuðstaðnum

Eg eri uppstillaður til **Býráðsvalið í Tórshavn** fyri **Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag**.

• Onkur vil kanska spyrja, hví eg ditti mær til at stilla upp? Jú, eg eri Havnarmaður og havi alsk til Tórshavn. Eitt slag av býarpolitiskari verndarskyldu, um eg kann orða tað soleiðis. **Fráfarandi býráð** undir **Tjóðveldisleiðslu** hevur roynst væl fyri Tórshavn. Vert er at nevna góðu og nógv batnaðu fíggjarstøðuna hjá býnum. Eg loyvi mær at halda at við mínum vinnulívsroyndum kann eg gera nakað konstruktivt í komandi valskeiði soleiðis at **ein góður býur verður munandi betri.**

• Einahelst vil eg royna at útvega **vinnulívinum** so góðar arbeiðsumstøður sum til ber. Tað er ein sannroynd, at eitt **virkið vinnulív** gevur tann **tryggleika** og tær **sjálvsøgdu socialu umstøðurnar** sum **vælferðarsamfelagið Tórshavn** krevur. Vinnulívið í Tórshavn má hava optimalar umstøður.

• Komandi Býráð má **kveikja** og **menna** nýtt virksemi innan økir sum **gransking**, **IT tøkni** og **bio medicin.** Sera stórur tørvur er á einari **altjóða kongress** og **granskingarmiðstøð** í Tórshavn. Býráðið má bróta upp úr nýggjum á hesum og øðrum nýskapandi vinnuøkjum. Tað eigur at motivera og ganga undan við kreativari nýhugsan. Eitt virkið, fjøltáttað **Vinnuráð** skal stovnsetast.

• Í Havnini búgva ídag umleið **1.300 fólkapensionistar**. Hetta tal fer at økjast nógv komandi árini og skulu sømulig kor verða tryggjaði okkara eldru borgarum. Eini **400 børn** tørva enn **dagstovnapláss**, eisini ein stór átrokandi uppgáva sum má loysast. **Ítrótturin** og ein **renningarbreyt** skulu hava neyðugar sømdir. **Tórsvøllur** skal gerast liðugur.

• **Ferðslan** í høvuðsstaðnum er alsamt vaksandi við nógvum vandum fyri okkara børnum og eldri fólki. Her skulu broytingar til. Við vaksandi oljuprísum fer tørvurin á **kollektivari ferðslu** at økjast.

• Vit eiga at taka støðu til **flogvøll á Glyvursnesi** hóast undirsjóartunnil til Vágarnar. Kanningar sum eru lidnar tosa í flestu førum **fyri** hesum vølli og vil hesin eisini geva nógv nýtt virksemi í Suðurstreymoy.

• Fráfarandi Býráð hevur gjørt góðar avtalur við aðrar býir um **samvinnu.** Komandi Býráð skal verða sera virkið við sínum **altjóða sambondum**. Nógv er gjørt fyri **mentunarlívið** í Tórshavn, men ikki er komið á mál. Okkara mongu kreativu listarfólk hava ikki teir figgjarligu karmar og umstøður sum ynskiligt er. Mentanin í Havnini skal stuðlast við munandi størri upphæddum.

• Støðugt **økjandi virksemi** í Føroyum, **ferðamannavinnan, oljuvinnan** og **batnandi búskaparligu umstøðurnar** yvirhøvur fara at seta sera stór krøv til Havnina og til førleikan hjá nýggja Býráðnum.Hetta verður ein stór **avbjóðing.** Tórshavn skal heldur ikki verða ov bundin av **íløgukarminum** hjá Landsstýrinum. Havnin hevur ein **íløgutørv** uppá slakar **700 Mió** og hevur eina sjálvsøgda



serstøðu sum **Høvuðstaður Føroyinga !**

Eg vil sera fegin frætta frá tær hvat **tú** sum Havnarborgari heldur? Hvat kann verða betri fyriskipað og hvat krevst av ábótum og broytingum? Eg vil verða glaður fyri ein email ella eitt fax við tínum viðmerkingum.

(E-mail:
johan_m@post.olivant.fo
Telefax : 31 13 18)

Johan Mortensen
Valevni fyri
Tjóðveldisflokkin

Almennur fyrilestur á Fróðskaparsetrinum

verður á Fiskirannsóknarstovuni mánakvøldið 2. oktober 2000 kl. 20.

Unnur Dís Skaptadóttir, ph.d., lektari á Félgasvísindadeild á Háskóla Íslands heldur fyrilestur, ið hon kallar: *Coping with changing economy in Northern localities. An Icelandic case study.*

Fyrilesturin verður á enskum.

Unnur Dís Skaptadóttir er lektari í antropologi á Félagsvísindadeild á Háskóla Íslands. Í 1995 fekk hon ph.d. heiti við The Graduate School and University Center of the City University of New York. Hon vitjar í Føroyum í sambandi við Granskingarverkætlanina fyri Økismenning í Klaksvík.

Um fyrilesturin sigur hon: In the talk I will examine some of the transformations that are taking place in Icelandic fishery based localities, transformations that involve new ressource management systems in the fisheries, new developments in technology and changing role of the state in regional development. Based on a case study of one locality, as an example, I consider the effects of these changes and how men and women cope with them.

Til ber at melda seg sum lim í Oljutinginum á seminarinum, ella í Vinnuhúsinum.

Seminar mikukvøldið 4. oktober

Vit bjóða til ókeypis seminar og ábit úti á Føroya Handilsskúla 4. oktober kl. 19.00.

Saman við Handilsháskúlanum BI í Stavanger er sett saman ein skrá undir heitinum: Oljuvirksemi í Føroyum. Møguleikar og avbjóðingar fyri vinnulív, almenna fyrisiting og útbúgvingarstovnar við atliti til Heilsu, Trygd og Umhvørvi.

Tilmelding í Vinnuhúsinum á telefon 311864 - ella um teldupost: industry@industry.fo, í seinasta lagi mánadagin 2. oktober.

OLJUTINGIÐ

MARKO´2000
SØLUSTEVNAN

Í ítróttarhøllini í Runavík 29. sept. - 01. okt.

Upp- og afturlatingartíðir

Fríggjadagin 17.00-22.00
Leygardagin 14.00-22.00
Sunnudagin 15.00-22.00

Sosialurin - 311820

Vælkomin á MARKO'2000 Sølustevnu í Ítróttar- og samkomuhøllini í Runavík



Jákup Mortensen, forma›ur í N.S.Í.

Vegna N.S.Í. fara vit hervi› at bjó›a tygum at vera hjartaliga vælkomin til omanfyrinevndu sølustevnu

Sum skráin sigur frá, er hetta ein stór sølustevna, sum felagi› er fegi› yvir at s‡na fram. Frá fríggjadegnum 29. september til sunnukvøldi› 01. oktober er Ítróttarhøllin karmur um ein sera fjøltátta›an aktivitet her á sta›num. Umlei› 30 fyritøkur s‡na fram á básum teirra tilbo› av ymiskum vørum til vi›skiftafólk. Umframt hetta fara fram onnur tiltøk í høllini har nevnast kann stór mótaframs‡ning, sangur og tónleikur, sum ver›ur framborin av fremstu listarfólkum vit hava á hesum øki, og sunnukvøldi› ver›ur gallas‡ning vi› mótas‡ning og undirhaldi. Frásøguma›ur er Magni Poulsen.

Sjálv sølustevnan ver›ur sett leygardagin kl. 15 av b‡rá›sformanninum í Runavík Jákup Lamhauge.

Hesin stóri aktivitetur fer óskerdur til rakstur av ítróttarfelagnum. Nes Sóknar Ítróttarfelag telist millum tey stóru feløgini í landinum, og hevur í ár 25 li› í fótbóltslandskappingini vi› tilsamans umlei› 280 leikarum, so ta› skulu nógvir pengar til at reka felagi›.

Tiltaki› vi› sølustevnumi skal eisini síggjast í tí samanhangi, at N.S.Í. í 1995 setti sær sum stevnumi›:

– At fáa ein gó›an og sunnan ítróttarungdóm í kommuni

– At gera N.S.Í. og sta›i› meiri sjónligt

– At umbo›a sta›i› mennandi og vir›iliga

Vælkomin á Marko' 2000 Sølustevnuna í Runavík

Nes Sóknar Ítróttarfelag